# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Oljugoymsla hjá Sp/f Krafta á Hulki** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Áarvegur 14, 2. hædd, 100 Tórshavn | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At taka ímóti, goyma og avskipa oljuúrdráttir, serliga gassolju. | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 367A | 662070 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 24/06382-3 | 26-07-2024 |

Argir hin 26/07-2024

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Katrin Haraldsdóttir Jensen, umhvørvisviðgeri

# Innihald

........................................................................ 1
Umhvørvisgóðkenning........................................................................ 1
1 Góðkenning og heimildir ........................................................................ 3
2 Umsóknin........................................................................ 3
3 Málsviðgerð ........................................................................ 4
3.1 Hoyring ........................................................................ 4
4 Virksemi og umhvørvisviðurskifti........................................................................ 5
5 Góðkenningartreytir........................................................................ 6
5.1 Almennar treytir ........................................................................ 6
5.2 Innrætting og rakstur ........................................................................ 6
5.3 Goymslur........................................................................ 7
5.4 Flutningur av olju........................................................................ 8
5.5 Spillluft........................................................................ 9
5.6 Spillvatn ........................................................................ 9
5.7 Óljóð, ristingar og ljós........................................................................ 9
5.8 Burturkast........................................................................ 10
5.9 Tilbúgving móti dálking vegna óhapp........................................................................ 11
5.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýriskipan........................................................................ 11
5.11 Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing........................................................................ 13
6 Kæruvegleiðing ........................................................................ 13
Fylgiskjal F1. Lýsing av virkseminum ........................................................................ 15
Fylgiskjal F2. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum........................................................................ 17

# 1 Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av oljugoymslu hjá Sp/f Krafta á Hulki í Sjóvar kommunu, á matr. nr. 367A, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum (umhvørvisverndarlógin), og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 við seinni broytingum, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

Oljugoymslur eru í bólki C í fylgiskjalinum til lógina. Hesi virki eru fevnd av kapittul 5 í lógini og skulu tí hava umhvørvisgóðkenning.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Sambært § 26, stk. 1 í umhvørvisverndarlógini mugu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir nevnd í fylgiskjalinum ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.

Hóast fyritøkur, virkir ella útbúnaðir ikki eru broytt sambært § 26, kann Umhvørvisstovan, sambært § 34, stk. 4, geva boð um bøtandi atgerðir ella forboð um framhaldandi rakstur fyrstu fimm árini eftir at góðkenningin er givin, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast, tá góðkenningin var givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin og dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Kunngerðir sum annars eru galdandi fyri hetta virksemi eru kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillvatn og kunngerð nr. 147 frá 1995 um burturkast við seinni broytingum.

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í Umhvørvisverndarlógini.

Umhvørvisstovan hevur brúkt norðurlendskar, í høvuðsheitum danskar, vegleiðingar og góðkenningar sum grundarlag til at áseta treytir um spillvatn, spillluft, óljóð og tilbúgving.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

Umhvørvisgóðkenning er givin við teimum treytum, sum í hesi góðkenning eru lýstar í kap. 5, Góðkenningartreytir. Treytirnar eru settar við støði í umsóknini, tilfari, sum er lagt afturat, og teimum upplýsingum, sum eru komnar fram undir málsviðgerðini.

# 2 Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 21. desember í 2023 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá Sp/f Krafta til oljugoymslu á Hulki, Sjóvar kommuna.

Saman við umsóknini hevur Umhvørvisstovan móttikið lýsing av viðkomandi útbúnaði frá Skanda industries, yvirlitsmynd við kloakk og oljuskiljing, umframt teldupost frá Sjóvar kommunu við játtan um leigu av øki á Hulki til oljugoymslu. Seinni hevur Umhvørvisstovan fingið dagførdar tekningar, tí nakrar broytingar vóru gjørdar í mun til upprunaligu ætlanina. Móttikna tilfarið hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

Hetta er í samsvari við § 30 í umhvørvisverndarlógini um, at saman við umsókn um góðkenning, sambært §§ 26-28, skulu verða hjálagdar neyðugar ætlanir, tekningar og frágreiðingar, ið gera ætlanina skilliga, umframt ein tilskilan av slag og nøgd av ætlaðu ella verandi dálking. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar við tí endamáli at minka um hesa dálking.

# 3 Málsviðgerð

Í viðgerðini av umsókninni og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn um umhvørvisgóðkenning við tilhoyrandi fylgiskjølum
- Vejledning om miljøkrav til store olieoplag, Miljøstyrelsen 2/2011
- Extern støj fra virksomheder, vejledning. Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: nr.5/1984
- Lavfrekvent støj, infralyd og vibrationer i externt miljø. Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: nr.9/1997

Vísandi til § 1, 1. Stk. í umhvørvisverndarlógini er dentur lagdur á at fyribyrgja og minka um dálking av luft, vatni og jørð, at fyribyrgja og minka um ampar av larmi, at fyribyrgja dálking við burturkasti og fremja endurnýtslu.

Harafturat er dentur lagdur á at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri heilsufrøðiligu og rekreativu (hvíldar- og frítíðar-) lívskorunum hjá menniskjum og fyri at varðveita fjøltáttað plantu- og djóralív sambært 2. stk. í somu grein.

Í viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at fyribyrgja og avmarka dálking av havi og luft, umframt minka um ampar av óljóði, lukti o.ø.
- at dálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt
- at virkið hevur mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum
- at innaneftirlit, umhvørvisstýrisskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum
- at besta tøka tøknin, sambært BAT-hugtakinum, verður nýtt í mest møguligan mun

## 3.1 Hoyring

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til Krafta til viðmerkingar tann 28. juni 2024. Krafta hevði nakrar nágreiningar og rættingar til lýsingina av virkseminum og umhvørvisviðurskiftunum. Krafta upplýsti, at nakrar smávegis broytingar vóru gjørdar fyri ætlaða virksemið og sendi nýggja støðumynd, sum vísti broytingarnar av m.a. tangagarði, lessirampu og ventilhúsið. Umhvørvisstovan hevur broytt umhvørvisgóðkenningina samsvarandi nýggju upplýsingunum.

Krafta hevði eisini viðmerking til treyt um, at Krafta skal máta og skráseta, hvussu nógv spillvatn verður leitt út frá virkinum um árið, og hvat endamálið var við hesi treytini. Umhvørvisstovan hevur broytt treytina.

Tann 12. juli 2024 var uppskot til umhvørvisgóðkenning sent til hoyringar hjá Krafta og Sjóvar kommunu. Hvørki Krafta ella Sjóvar kommuna høvdu viðmerkingar til uppskotið.

# 4 Virksemi og umhvørvisviðurskifti

Vísandi til tilfarið í umsóknini verður gjørd ein lýsing av oljugoymsluni og virkseminum.

Krafta á Hulki í Sjóvar kommunu tekur ímóti og veitir gassolju til skip. Harafturat hevur Krafta goymslu av gassolju í tveimum 2.500 $m^3$ stáltangum, lessirampu til tangabilar og ein lítlan skúr, har tað verður teknikkrúm, WC og uppihaldsrúm.

*Nærri lýsing av virkseminum í Fylgiskjali F1.*

Niðanfyri er ein lýsing av umhvørvisviðurskiftunum í sambandi við virksemið hjá Krafta á Hulki við ábendingum um treytir, sum kunnu verða settar til virksemið. Tær endaligu ásettu treytirnar eru í kap. 5 í hesi góðkenning.

Oljugoymslan hjá Krafta á Hulki er staðsett á matrikul nr. 367a, sum sambært byggisamtyktini fyri Sjóvar kommunu er øki D, havnaøki.

Størsta umhvørvisliga dálkingin, ið kann standast av virkseminum, er oljudálking í sambandi við ein leka ella óhapp. Tí setur Umhvørvisstovan treytir um, at mannagongdir, ið avmarka váðan fyri, at lekar ella óhapp koma fyri, skulu fylgjast. Treyt verður harafturat sett um, at alt vatn frá bæði tangaøkinum og lessirampuni verður leitt ígjøgnum ein oljuskiljara fyri at tryggja, at olja ikki rennur á sjógv.

*Nærri lýsing av umhvørvisviðurskiftunum í Fylgiskjali F2.*

# 5 Góðkenningartreytir

Sambært § 31, 2. stk. í umhvørvisverndarlógini skulu í góðkenningini verða nevndar ásettu treytirnar viðvíkjandi stovnsetan og rakstri virkisins.

Oljugoymslan hjá Krafta á Hulki kann taka ímóti, goyma og veita gassolju til skip og tangabilar. Mest loyvda goymsla á økinum er 5.000 $m^2$ ella 5 mió. litrar av gassolju. Umhvørvisgóðkenningin umfatar annars alt virksemið, sum er knýtt at oljugoymsluni á Hulki. Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

## 5.1 Almennar treytir

5.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera tøk á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og treytirnar í góðkenningini.

5.1.2 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felagi, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

5.1.3 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av Krafta.

5.1.4 Um virkið verður broytt byggifrøðiliga ella rakstrarliga, soleiðis at útlát frá frá virkseminum økist, skal Krafta senda Umhvørvisstovuni skrivliga fráboðan um hetta frammanundan. Umhvørvisstovan tekur støðu til, um neyðugt er við nýggjari góðkenning.

5.1.5 Um virkið skiftir eigara, broytir navn ella verður tikið av, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta.

5.1.6 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar, útgerð o.a. uttandura antin tryggjast, soleiðis at tað ikki er til ampa fyri umhvørvið, ella beinast burtur. Harafturat skal eigari ella brúkari tryggja, at olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

5.1.7 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir áðrenn virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av, umframt at treyt 5.1.6 verður sett í verk so skjótt sum gjørligt.

5.1.8 Krafta hevur ábyrgdina av, at allar treytir í hesi góðkenning verða hildnar, eisini tá ið talan er um uttanhýsis veitarar og fyri flutningsfør, meðan tey eru á økinum hjá virkinum.

## 5.2 Innrætting og rakstur

5.2.1 Virkið skal verða rikið og staðsett, sum sagt er frá í umsóknini og øðrum móttiknum tilfari.

5.2.2 Raksturin skal fara fram soleiðis, at øll økir, sum hoyra til virkið, eru ruddilig og rein.

5.2.3 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av olju og øðrum dálkandi ella vandamiklum evnum, skal gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

5.2.4 Øll økir, har olja verður umskipað ella goymd, skulu vera gjørd úr tilfari, sum tolir olju og er oljutætt.

5.2.5 Øll økir, har olja verður umskipað ella goymd, skulu vera gjørd ella skipað soleiðis, at tey halda oljuspilli frá lekum ella óhappum inni á viðkomandi øki.

5.2.6 Øll økir, har olja ella oljuúrdráttir vera goymdir í smærri íløtum, skulu vera væl skipað og ruddilig.



Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

5.2.7 Økið kring ventilhús skal skipast soleiðis, at oljuspill millum hús og bryggjukant verður hildið aftur.
5.2.8 Øll øki, har olja verður umskipað ella goymd, skulu hava lokað frárensl við hóskandi reinsiskipanum, trygdarskipanum og ávaringarskipanum.
5.2.9 Krafta skal tryggja, at allir veitarar, sum arbeiða inni á virkinum, kenna og fylgja viðkomandi treytum í hesi góðkenning.

### 5.3 Goymslur

5.3.1 Oljutangar skulu standa á tryggum lendi og í garði, sum heldur spilli ella lekum av olju aftur.
5.3.2 Oljugoymslutangar skulu hava ein hóskandi lit, sum gevur lítla upphiting av sólarljósi.
5.3.3 Oljugoymslutangar skulu hava tøkniliga skipan, sum alla tíðina mátar, hvussu nógv olja er í tangunum, og sum boðar frá, um oljustøðan verður ov høg, ov lág ella lækkar ov skjótt. Harafturat skal ein eyka skipan til at máta oljunøgdina við vera tøk.
5.3.4 Oljugoymslutangar skulu eisini hava óhefta skipan, sum boðar frá, um oljustøðan verður ov høg.
5.3.5 Ávaringarskipanirnar skulu boða frá á eftilitsstøðum og t.d. við ljóði og ljósi, sum sæst ella hoyrist við móttøkuna ella oljutangarnar so mikið týðiliga, at tíð er til at steðga flutningi av olju, áðrenn olja flýtur yvir.
5.3.6 Streymveiting til oljupumpur skal kunna brótast av við pumpurnar, við ventilhúsið og við lessirampuna.
5.3.7 Ein mannagongd fyri, hvussu tangavatnið verður tikið úr goymslutangunum, skal vera til staðar.
5.3.8 Rørleiðingar til olju skulu vera gjørdar soleiðis, at tað skal vera møguligt at hava eftirlit við lekum og at savna olju frá møguligum lekum.
5.3.9 Kontraventilur skal vera á uppskipingarrørleiðingum, og sjálvvirkandi lokaventilar skulu vera á avskipingarrørleiðingum.
5.3.10 Allar týðandi rørleiðingar skulu kunna latast upp ella aftur við handakraft.
5.3.11 Tangagarður kring gassoljutangar skal í minsta lagi rúma 1,1 ferðir rúmdina í tí størsta tanganum.
5.3.12 Ventilur til at tøma regnvatn úr tangagarði skal altíð vera stongdur. Eftirlit skal vera við, tá tangagarðurin verður tømdur, og opin ventilur má ikki loyva størri vatnnøgd ígjøgnum, enn oljuskiljari alla tíðina kann viðgera.
5.3.13 Oljuskiljari við bæði ventili við sjálvvirkandi læsing og ávaringarskipan kann vera á frárenslinum frá tangagarðinum í staðin fyri áseting í pkt 5.3.12, um Krafta kann vísa á, at ávaringarskipanin er álítandi, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og læsingin er oljutøtt.
5.3.14 Tangar, pumpustøðir og rørleiðingar skulu vera tryggjaðar ímóti, at akfør kunnu koyra á tey.
5.3.15 Tangar og rørleiðingar skulu verjast ímóti tæring.
5.3.16 Rørleiðingar, ventilar, pumpur og tílíkt, sum ikki verða brúkt, skulu takast niður, og øll eftirverandi op skulu tippast.
5.3.17 Tá rør, sum liggja í lendinum, skulu skiftast, skulu tey leggjast í betongrennu ella tilsvarandi verju fyri at minka um dálkingina í sambandi við møguligt óhapp/spill.

Aðrar goymslur

5.3.18 Kemikalii skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslurnar.
5.3.19 Kemikaliigoymslur skulu hava kemikaliitætt gólv uttan frárensl til spillvatnsleiðing og vera skipaðar soleiðis, at útlát vegna lekar ella óhapp kunnu haldast aftur í kemikaliutøttum garði, bakka ella tanga.
5.3.20 Garður, bakki ella tangi skal kunna rúma nøgdini, sum kann vera í tí størsta ílatinum á staðnum.
5.3.21 Innandura kemikaliigoymslur, har vandi er fyri, at gass ella gassblanding kann elva til spreinging og brádliga økta dálking, skulu hava hóskandi luftskifti.
5.3.22 Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum, sum hóska til endamálið, t.d. UN-góðkend íløt, sum eru merkt soleiðis, at tað sæst, hvat er í.
5.3.23 Ein hóskandi nøgd av olju- ella kemikaliisúgvandi tilfari skal altíð vera tøk, har olja ella kemikalii verða goymd í smærri íløtum.
5.3.24 Olju- ella kemikaliileivdir skulu í størst møguligan mun takast upp við súgvandi tilfari ella á annan hátt, áðrenn gjørt verður reint.
5.3.25 Spillvatn við sápu ella oljuemulgerandi evnum frá uttandura goymslum skal ikki leiðast ígjøgnum oljuskiljarar.

## 5.4 Flutningur av olju

5.4.1 Áfylling á tangar, tangabilar o.a. og pumping millum tangar skal altíð vera undir eftirliti, og skulu greiðar mannagongdir vera um hetta, sum m.a. innihalda ábyrgdarbýti, útgerð, eftirlitslistar og annað av týdningi.
5.4.2 Øll uppskiping av olju millum tangaskip og oljugoymslur og øll avskiping av olju frá oljugoymslum til skip skal gerast soleiðis, at hetta í minsta lagi lýkur treytirnar í Kunngerð nr. 84 frá 2. juli 2010 um bunkring, flutning av olju o.a.
5.4.3 Tá Krafta tekur ímóti olju frá skipi ella veitir olju til skip, skulu ábyrgdarpersónar vera bæði hjá móttakara og veitara, meðan olja verður flutt. Hesir skulu kunna samskifta beinleiðis, um neyðugt umvegis hóskandi samskiftisútgerð.
5.4.4 Ventilur á frárensli frá tangagarði skal vera stongdur, meðan olja verður fylt á tangarnar, uttan mun til um sjávvirkandi ventilur er á frárenslinum.
5.4.5 Serstakt eftirlit skal vera við oljuleiðing millum skip og ventilhús.
5.4.6 Áðrenn áfylling byrjar, skal kannast, um øll rør og allar slangur eru tryggar, og at allir ventilar eru í rættari støðu.
5.4.7 Fyri hvønn einstakan tanga, sum olja skal fyllast á, skal innihaldið verða mált og avtala gjørd um, hvussu nógv olja skal fyllast á, áðrenn áfylling byrjar.
5.4.8 Áfylling skal steðgast beinanvegin, um tekin eru um, at áfyllingin ikki fer fram trygt, forsvarliga og sambært avtalaðum mannagongdum, t.d. um radiosamband millum veitara og móttakara gerst óvirkið, tekin eru um ovfylling, skaða á útgerð ella annað óvæntað.
5.4.9 Hóskandi útgerð at avmarka og basa dálking skal vera á staðnum.

## 5.5 Spillluft

5.5.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttanfyri øki virkisins.
5.5.2 Allar útleiðingar til luft skulu leiðast í minsta lagi ein metur upp um tak.
5.5.3 Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum luftbornum evnum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til at fáa hetta á eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 5.6 Spillvatn

5.6.1 Krafta skal reinsa spillvatnið[1] frá virkseminum soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða hildin aftur.
5.6.2 Alt spillvatn, sum kann innihalda mineralska olju, skal gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum botnfellingartanga og oljuskiljara við sjálvvirkandi læsing og endurtakandi ávaring um tjúkd av oljulagi, hækkandi og lækkandi vatnstøðu ella aðra hóskandi skipan.
5.6.3 Sýnistøkubrunnur skal vera aftan á hvørja einstaka reinsiskipan.
5.6.4 Frárenning frá virkinum má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking.
5.6.5 Spillvatn skal leiðast í góðkenda kommunala spillvatnsskipan.
5.6.6 Um góðkend kommunal spillvatnsskipan ikki er tøk, skal spillvatn leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.
5.6.7 Elvir spillvatnsútleiðing til uppsavnan av evnum og tilfari í sjóvarmála ella á botni, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing. Umhvørvisstovan skal kunnast um ætlaðar atgerðir.
5.6.8 Útleiðingar á sjógv skulu vera so fáar sum gjørligt.
5.6.9 Munnin á øllum spillvatnsleiðingum skal í minsta lagi vera ein metur undir størstu fjøru.
5.6.10 Nýtsla av reingerðarevnum, sóttreinsingarevnum og evnum til at forða gróðri, skal avmarkast mest møguligt, og miðast skal eftir at nýta tey mest umhvørvisvinarligu evnini og í minst møguligan mun at nýta evni, sum hava langa tíð um at verða niðurbrotin, sum hópast upp í livandi verum, ella sum eru eitrandi.
5.6.11 Ein sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av spillvatninum, skal vera eftir reinsiskipanina á hvørjari útleiðing.
5.6.12 Spillvatnið kann í mesta lagi innihalda 10 mg/L av mineralskari olju (DS/R 208 ella tilsvarandi mannagongd).

## 5.7 Óljóð, ristingar og ljós

5.7.1 Krafta skal miða eftir at brúka bestu tøku tøkni og bestu mannagongdir (sambært BAT) at avmarka og doyva óljóð frá virkseminum.

---

[1] Spillvatn er regnvatn og vatn, sum verður brúkt til at spula og gera reint við, og vatn sum hevur verið beinleiðis í sambandi við framleidda vøru ella við burturkast ella er dálkað av øðrum ávum.

**Umhvørvis**stovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

5.7.2 Krafta hevur ábyrgd av, at bil- og trukkførarar eins og skip, ið hava beinleiðis tilknýti til virksemið, ella sum arbeiða á virkinum, halda treytirnar í hesi góðkenning viðvíkjandi óljóði.

5.7.3 Ískoytið til óljóðstyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá Krafta og beinleiðis avleiddum virksemi, skal ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

| Dagur | Klokkutíð | Tímar | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |
| Hámarksvirði | 22-07 | | | | 55 | 50 |

Óljóðtyngdin: Óljóðstøðið, mált sum orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark
Tímar: Miðal óljóðstyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði má ikki fara upp um markvirðið, t.d. má miðalvirðið fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) fyri Øki 4.
Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram
Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki
Øki 4: Bústaðarøki

5.7.4 Hægsta loyvda løtuvirðið fyri óljóð frá virkinum í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um nevndu markvirði.

5.7.5 Markvirðini fyri lágfrekvent óljóð og infraljóð sum harðasta 10 minuttirs tíðarbil, mátað innandura, eru:

| Øki | Tíðarskeið | 10-160 Hz dB(A) | < 20 Hz dB(G)* |
|---|---|---|---|
| Í bústøðum, á stovnum o.l. | 18.00 - 07.00 | 20 | 85 |
| Í bústøðum, á stovnum o.l. | 07.00 – 18.00 | 25 | 85 |
| Á skrivstovum, í frálæru-hølum og øðrum líknandi ljóð-viðkvæmum rúmum | - | 30 | 85 |
| Í øðrum rúmum á virkjum | - | 35 | 90 |

*) dB(G): G-vigað infraljóðstøði

5.7.6 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur ampar av ristingum við sær.

5.7.7 Nýtsla av ljósum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

5.7.8 Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 5.8 Burturkast

5.8.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast, og skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

5.8.2 Burturkast skal altíð goymast í íløtum ella bingjum, sum hóska til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.
5.8.3 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.
5.8.4 Íløt við serliga dálkandi burturkasti, sum standa úti, skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki samsvarandi kap. 5.3.
5.8.5 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu verða sett og tryggjað soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

## 5.9 Tilbúgving móti dálking vegna óhapp

5.9.1 Krafta skal innan 31.12.2024 gera eina váðameting av møguligum óhappum, sum kunnu føra til brádliga økta dálking ella ampar.
5.9.2 Við støði í váðametingini skal Krafta ráða yvir ella hava avtalu um hóskandi útgerð til at steðga útláti og at taka upp eftir útláti, so umhvørvisligu árinini verða so smá sum gjørligt.
5.9.3 Út frá váðametingini skal Krafta gera ein tilbúgvingarætlan við mannagongdum til at fyribyrgja og boða frá óhappum, og at steðga ella avmarka útlát á hóskandi og skjótan hátt, um óhapp skuldu komið fyri.
5.9.4 Avrit av váðameting og tilbúgvingarætlan skulu sendast til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 12 mánaðar eftir, at umhvørvisgóðkenningin er lýst.
5.9.5 Henda óhapp, skulu tiltøk beinanvegin setast í verk til at avmarka møguligar fylgjur og at taka dálkandi tilfar upp.
5.9.6 Umhvørvisstovan skal hava boð um óhapp, sum hava brádliga økta dálking við sær[2]. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk, tiltøk til at basa og taka upp eftir brádliga dálking og tiltøk, sum eru sett í verk fyri at tryggja, at líknandi óhapp ikki kemur fyri aftur, sendast Umhvørvisstovuni.

## 5.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýriskipan

5.10.1 Krafta skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

*Umhvørvisstýriskipan*

5.10.2 Krafta skal hava eina umhvørvisstýriskipan, sum hevur mannagongdir til stýring av virksemi, dálkingaravmarkandi tiltøkum, viðlíkahaldi, eftirliti, skráseting, sýnistøku o.a.
5.10.3 Krafta skal í seinasta lagi 31.12.2024 senda Umhvørvisstovuni ein samandrátt av umhvørvisstýriskipanini.
5.10.4 Um umhvørvisstýrisskipanin ikki hevur serstaka sertifisering, skal Krafta hava ein innanhýsis skoðanarbólk, soleiðis at skipanin verður eftirmett í minsta lagi eina ferð um árið.
5.10.5 Umhvørvisstovan kann krevja avrit av árligu eftirmetingini og áseting av nýggjum árligum málum.

*Útgerð, goymslur o.a.*

[2] Um dálkingaróhapp førir til, at dálkandi evni fer út um virkisøkið, skal í minsta lagi løgreglan og møguliga MRCC (um olja fer á sjógv) hava boð um tað.

5.10.6 Krafta skal kanna nøgdina av gassolju í goymslutangunum hvønn dag. Um kanningar vísa, at minni er í einum tanga enn væntað í mun til uppskiping, avskiping, hitabroytingar og mátióvissu, skal kannast hvør orsøk til trotið kann vera og neyðug tiltøk setast í verk.

5.10.7 Krafta skal hava regluligt eftirlit við og viðlíkahald av reinsiskipanum og uppsamlingarbrunnum til spillvatn, so hesi virka sambært forskriftunum. Nevndu eftirlit skulu gerast í minsta lagi einaferð um árið.

5.10.8 Krafta skal hava mannagongdir til regluligt og hóskandi eftirlit við og viðlíkahald av oljutangum, oljurørleiðingum, ventilum, pumpum, ávaringarskipanum, tangagarði og oljurørkanalum fyri at tryggja, at hesi virka sambært forskriftunum og at fyribyrgja, at óhapp henda. Nevndu eftirlit skulu gerast í minsta lagi eina ferð um árið.

5.10.9 Eftirlit við goymslutangunum, har tangarnir verða kannaðir innan og uttan, skal vera fimta hvørt ár. Umhvørvisstovan kann geva loyvi til at víkja frá tíðarætlanini.

5.10.10 Frágreiðing við upplýsingum um tangaeginleikar, kanningarhátt, mátingar og staðfestingar, meting av tangastøðu, tilmæli um átøk og ætlaða nýggja kanning skal gerast eftir kanningina.

5.10.11 Oljurørleiðingar millum oljugoymslur og ávikavist ventilhús og lessirampu skulu kannast eina ferð um árið til tess at staðfesta, at hesar eru tættar.

5.10.12 Slangur til uppskiping ella avskiping av olju skulu goymast, handfarast, kannast og roynast sambært leiðbeining frá veitara. Minst einaferð um árið skal tó kannast, um hesar slangur eru tættar.

*Spillvatn*

5.10.13 Fyrstu trý árini skal Krafta taka fýra sýnir av spillvatninum um árið, meðan tað regnar meira enn miðal. Sýnini skulu takast javnt býtt ígjøgnum árið og kannast sambært 5.6.12.

5.10.14 Fyrsta sýnið av spillvatni frá framleiðsluni skal takast fyrstu ferð í seinasta lagið ein mánað eftir, at virksemið er byrjað.

5.10.15 Um tað verður mett neyðugt kann Umhvørvosstovan krevja at Krafta skal máta og skráseta, hvussu nógv spillvatn verður leitt út frá virkinum um árið.

5.10.16 Um Krafta metir, at onnur dálkandi evni kunnu vera í spillvatninum enn tey, sum eru nevnd í 5.6.12, hevur virkið skyldu til at kanna hesi og boða Umhvørvisstovuni frá úrslitunum í seinasta lagi ein mánað eftir, at kanningin er tøk.

5.10.17 Trý ár eftir at góðkenningin er komin í gildi, kann Krafta søkja um at fáa títtleikan av sýnistøkum og kanningum broyttan. Við umsóknini skal Krafta senda eina frágreiðing um gongdina seinastu trý árini.

5.10.18 Við støði í frágreiðingini frá Krafta og øðrum tilfari tekur Umhvørvisstovan støðu til, um tað framvegis er neyðugt at taka sýni av spillvatni á virkinum ella um títtleikin av sýnistøkum skal broytast.

*Kanningar og frágreiðingar*

5.10.19 Krafta ger eina kanningar- og eftirlitsskrá fyrst í hvørjum ári, og Umhvørvisstovan kann biðja um at fáa avrit av henni.

5.10.20 Krafta eftirmetir skrivliga øll eftirlit og allar kanningar. Umhvørvisstovan kann biðja um at síggja hesar eftirmetingar.

5.10.21 Alla kanningar skulu gerast, meðan virksemið er so nógv sum gjørligt.

5.10.22 Mannagongdir, rakstrarskrásetingar, kanningarúrslit og frágreiðingar skulu goymast í fimm ár og til eina og hvørja tíð vera atkomuligar hjá eftirlitsmyndugleikanum. Tó skulu frágreiðingar frá eftirliti av tangum goymast, so leingi tangin er í brúki.

5.10.23 Umhvørvisstovan kann krevja, at Krafta ger serstakar kanningar ella mátingar, um ábending er um serliga dálking ella ampar, ella fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

5.10.24 Krafta kunnar Umhvørvisstovuna um niðurstøðurnar í øllum omanfyrinevndu kanningum, frágreiðingum og ætlanum í minsta lagi eina ferð um árið.

5.10.25 Um ein kanning ella frágreiðing vísir týðandi frávik frá ásettu treytunum, skal Krafta í seinasta lagi eina viku eftir, at tílík kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni avrit av kanning ella frágreiðing, og í seinasta lagi ein mánað eftir, at kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni ætlan um bøtandi atgerðir.

### 5.11 Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

5.11.1 Krafta skal skráseta hesar upplýsingar:

- allar uppskipingar og avskipingar av gassolju,
- dagligt eftirlit við nøgdini av gassolju sambært 5.10.6,
- nýtsla av kemikalium, íroknað reingerðarevni og sóttreinsingarevni,
- nøgdir og slag av burturkasti, íroknað vandamikið burturkast og evju úr reinsingarskipanum v.m., og tilhoyrandi móttakara,
- eftirlit av oljutangum og rørskipanum og tilhoyrandi viðlíkahald,
- eftirlit, roynd og viðlíkahald av reinsingarskipanum til spillvatn,
- kanningarúrslit av tiknum sýnum av spillvatni,
- dálkandi óhapp ella næróhapp, orsøk og frágreiðing um árin og upprudding v.m.

5.11.2 Krafta ger hvørt ár eina umhvørvisfrágreiðing, sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingum,
- uppgerð av samlaðum útlátum av kannaðum evnum,
- kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrslitum,
- dálkandi óhapp,
- frágreiðing um umhvørvisskipan og umhvørvisviðurskifti,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a.

sum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

# 6 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. Desember 2008, kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdag.



**Umhvørvis**stovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

# Fylgiskjal F1. Lýsing av virkseminum

## Staðseting

Oljugoymslan hjá Krafta á Hulki er staðsett á matrikul nr. 367a, sum sambært byggisamtyktini fyri Sjóvar kommunu er øki D, havnarøki. Sambært ásetingum fyri øki D í byggisamtyktini verður økið lagt av til havnaendamál og annað virksemi, so sum ferjulegu, bátahavn, handverksvinnu, maskinverkstað, frysti- og goymslutunlar og til ídnað so sum skipasmiðju og tænastufyritøkur, bilstøðlar og tílíkt.

## Virksemi

Tangaskip fara at koma regluliga við gassolju (logahiti>55 $^{o}$C, flokkur III-1) til goymsluna hjá Krafta á Hulki. Krafta veitir bæði skipum og tangabilum gassolju frá goymsluni. Mett verður, at tað fara at renna umleið 40.000 m$^3$ av olju ígjøgnum goymsluna um árið. Hetta svarar til, at eitt tangaskip kemur við olju eina ferð um mánaðin.

Gassolja verður goymd í tveimum 2.500 m$^3$ stórum stáltangum. Tangarnir vera 17,2 metrar høgir og tvørmátið er 14,1 metrar. Mesta hædd íroknað topp og rekkverk er 18 metrar. Tangarnir fara at standa í einum tangagarði á vinnuøkinum á Hulki í Sjóvar kommunu. Tangagarðurin verður gjørdur soleiðis, at hann rúmar nøgdini á størsta tanganum + 10 %. Væntandi verður tangagarðurin 42 x 22 metrar, og verður hæddin 4,2 metrar. Alt frárensl frá tangagarðinum verður leitt ígjøgnum oljuskiljara, sum verður knýttur at verandi spillvatnsleiðing. Økið hevur fyrr verið nýtt til oljugoymslu. Á økinum verður eisini ein lessirampa, har tangabilar taka olju, eitt ventilhús á bryggjukantinum og ein skúrur við teknikkrúmi, WC og uppihaldsrúmi. Tvær pumpur verða á økinum, sum veita olju til lessirampu og ventilhús. Pumpurnar verða staðsettar í tangagarðinum.


**Umhvørvis**stovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo




Mynd 1. Støðumynd av oljugoymsluni á hulki.

# Fylgiskjal F2. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Í hesum kapitli verða umhvørvisviðurskiftini hjá Krafta á Hulki í Sjóvar kommunu lýst. Sum grundarlag til at áseta treytir hevur Umhvørvisstovan, umframt føroyska lóggávu, brúkt norðurlendskt, í høvuðsheitum danskt, lógartilfar, vegleiðingar og viðkomandi góðkenningar. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftunum er dentur lagdur á at minka um dálking og ampar frá útláti av spillvatni, lukti og larmi frá virkseminum og at minka um árin frá dálking við kemikalium vegna óhapp.

## F2.1 Uppskipingarstøð og avskipingarstøð

Í sambandi við bæði upp- og avskiping av olju kann leki koma fyri í ventilhúsinum ella leiðing millum ventilhús og skipssíðu/skipslúnning.

Undir ventilunum í ventilhúsinum er tætt undirlag við frárensli í ein 1.000 litra niðurgrivnan tanga, ið tekur ímóti tí, sum møguliga lekur niður á gólv. Tangin hevur yvirfyllingaralarm, ið gevur boð, tá ið hann er um at verða fullur.

Oljuleki millum ventilhús og skip rennur út á bryggjuna, sum ikki hevur trygdarkant ímóti sjónum ella uttan um ventilhúsið. Leki millum bryggju og skip rennur tí beinleiðis á sjógv. Vanliga er eingin leki millum ventilhús og skipssíðu, av tí at slangan er í einum stykki. Krafta hevur absorberandi tilfar til at taka olju upp við á goymslu í skúrinum við lessirampuna og í ventilhúsinum. Harumfarmt hevur Krafta samskift við Skálafjarðar sløkkilið um tilbúgving. Skálafjarðar sløkkilið hevur útgerð til at basa oljudálking.

Skip koma við olju umleið eina ferð um mánaðin. Í tí sambandi stavar óljóð frá motorum og pumpum. Tað eru umleið 175 metrar frá bryggjukanti til næstu bústaðir. Harumframt kann nakað av óljóði vera, tá ið tangabilar taka olju frá lessirampuni.

Í kap. 5.2 verður treyt sett um, at Krafta ger mannagongdir og hevur tilfar til at fyribyrgja, at olja fer á sjógv í sambandi við uppskiping og avskiping av olju.

Í kap. 5.4 er treyt sett um, at Krafta í minsta lagi skal lúka treytirnar í kunngerð nr. 84 frá 2010 um bunkring, flutning av olju o.a. í sambandi við bunkring av skipum og eina tilsvarandi mannagongd í sambandi við innflutning av olju.

Í kap. 5.7 verða treytir settar um árin av óljóði.

## F2.2 Tangaøkið

Á tangaøkinum eru tveir tangar, ið verða nýttir til goymslu av gassolju. Báðir tangarnir, ið eru úr stáli, eru 17,2 metrar høgir, 14,1 metrar í tvørmáti og rúma 2.500 $m^3$. Nærmasti bústaður at tangaøkinum er áleið 70 metrar haðani.

Ein 4,2 metur høgur betonggarður verður gjørdur rundan um oljutangarnar, ið rúmar áleið 10% meira enn annar tangin. Tangagarðurin er úr betong, og tangarnir standa á betongfundamenti. Millum tangabotn og betongfundament er eitt tunt lag av asfalti.

Tangagarðurin er tættur og hevur frárensl við lukkaðum ventili uttanfyri tangagarðin, sum er stýrdur manuelt. Tangagarðurin verður tømdur regluliga. Áðrenn tøming verður kannað, um olja er í tangagarðinum. Síðani verður ventilurin latin upp og yvirflatuvatn ført gjøgnum oljuskiljara, sum er knýttur í verandi spillvatnsleiðingar. Tveir oljuskiljarar verða á økinum: Ein knýttur til tangagarðin og ein á økinum við lessirampuna. Oljuskiljararnir halda olju, benzin og øðrum evnum, sum flóta á vatni aftur. Oljuskiljararnir hava slamfang, oljuútskiljing og sýnistøkubrunn. Oljuskiljararnir hava sjálvvirkandi afturlating á frárenningini, sum letur aftur, tá ið oljuskiljarin er fullur.

Reinsaða vatnið úr oljuskiljarunum verður leitt beinleiðis á sjógv. Sambært §§ 10-11 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillvatn verða settar treytir til, at spillvatnsútleiðingin skal vera í minsta lagi 1 metur undir størstu fjøru og leiðast á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi. Hesar treytir verða settar fyri at tryggja, at ein spillvatnsútleiðing ikki elvir til uppsavnan av evnum og tilfari, ið kunnu ávirka umhvørvið við útleiðingina.

Í kap. 5.3 verða treytir settar til tangagarð, goymslur og rørskipanir, og í kap. 5.10 verða settar treytir um, at Krafta hevur mannagongdir til eftirlit og viðlíkahald av oljutangum og rørleiðingum, at Krafta hevur mannagongdir til eftirlit, viðlíkahald og tøming av oljuskiljarum og sandfangum, og at Krafta hevur mannagongdir og skjalprógvar regluliga eftirlitsgongd (rundering) kring tangaøkið.

Í kap. 5.9 verður treyt sett við, at Krafta ger eina váðameting av óhappum, sum kunnu føra til brádliga økta dálking.

### Áfyllingarstøð til tangabilar

Lessirampan stendur norðanfyri tangagarðin og skúrin. Pumpurnar standa inni í tangagarðinum. Tangabilarnir standa á stoyptum øki við frárensli í oljuskiljara, ið tekur 15 L/s. Oljuskiljararnir hava sjálvvirkandi afturlating og ávaringarskipan, um nøgdin av olju verður ov stór. Regnvatn og møguligt oljuspill frá lessingarrampuni fer beinleiðis í oljuskiljaran.

Í sambandi við áfylling á tangabilar er ein trygdarskipan, sum forðar fyri, at ov nógv olja verður latin í ein tanga ella eitt tangarúm.

Í kap. 5.2 verða treytir settar um, at økið, har olja verður umskipað, er úr tilfari, sum olja ikki treingir ígjøgnum, er í góðum standi, og at olja ikki fer av økinum hjá Krafta. Í kap. 5.6 verða treytir settar um, at frárensl er til tætta kloakk við hóskandi reinsiskipan og ávaringarskipan.

## F2.4 Goymsla til oljuúrdráttir í íløtum

Krafta hevur ikki aðra goymslu av oljuúrdráttum ella kemikalium, men greitt verður frá, at Krafta innrættar og skipar økið soleiðis, at treytir í umhvørvisgóðkenningini verða hildnar, at smærri íløt av oljuúrdráttum og kemikaliu standa forsvarliga í sambandi við viðlíkahaldsarbeiði, sýnistøkur og líknandi.

Í kap. 5.3 verða treytir settar til goymslur av oljuúrdráttum, kemikalium o.a.